

ímóti síni virðisløn fyri at vald til bestu songkvinnu. Hon er jú ein kvinna, sum av sonnum má sigast at kenna eitt sindur til, at jørðin er rund, tí í løtuni ferðast hon víða hvar kring knøttin við antin Yggdrasil, Bill Bourne ella onkrum øðrum og syngur fyri fullum húsum í eitt nú Wien. Men hóast Eivør var stødd í Havn hetta kvøldið, so var hon tó bundin av tveimum útseldum konsertum saman við Lenu og Guðrun hetta kvøldið, og tí tók ein umboðsmaður ímóti hennara igulkeri.

## 200, Terji og samfelagsrevsing

Kim Hansen, sum var valdur at vera besti mannligi sangari framman fyri m.a. Teit Lassen og Kára Sverrisson, var tó til staðar, og undirhelt fleiri ferðir hetta kvøldið m.ø. Petsi Tvørfoss, Terja Rasmussen og Frændum.

Tí nógvur tónleikur var sjálvandi á skránni. Serliga fingu 200 lív í salin, men eisini Terji kom væl frá síni framførslu, har hann ikki sørt polemiskt, men rámandi gjørdi viðmerkingar til bæði kjakið frá prixnum í fjør um "gamlar" tónleikarar til orðaskiftið um samkynd, sum ikki sær út til at vera køvt enn.

Kjakið um rættindini hjá samkyndum var eisini ein partur av innihaldinum í tekstunum hjá 200 hetta kvøldið, og sum onkur tók til, so var tað jú ikki annað enn væntandi, at ein satirisk viðmerking fór at koma frá teimum um "Javnaðarflokkin for så vidt angår Gerhard Lognberg", sum onkur tók til. Jú, eins og tónleikarar úti í heimi sum t.d. Bob Geldof og Bono eru við til at seta eina dagsskrá, sum politikararnir ikki hætta sær at fara undir, tykist tað, sum tað eisini í Føroyum eru tónleikarar, ið ynskja at taka mál upp, sum teir politisku flokkarnir ikki vilja nerta við eini eldtong, tí í sokallaðum etiskum málum skal eingin felags floksstøða takast.

Eisini her merktist ein alheimsdámur í hesum tiltakinum, og sjálvt planethugtakið fekk aftur eina nýggja rúmd, um eg so má siga.

## Hugni og rós

Tað er kanska okkurt um hatta, sum Gasolin' sungu um á sinni um, at "Kloden drejer stille rundt". Men eins hetta við at jørðin melur, sum hon skal, sær tað ikki mætari út, enn at menningin á tí føroyska tónleikapallinum eisini gongur stútt og væl. Tí meðan vit enn klára at syngja við og taka ein sving-om saman við góðu, gomlu Frændum og sangum um "at verja tína egnu jørð", so ber eitt tiltak sum Planet Awards boð um, at vit við nøvnum sum Marius og 200 megna at hýsa musikarum her í Føroyum, sum klára at skapa eitt ljóðbílæt, ið hoyrist aftur í einum so drúgvum tiltaki. Gaman í, vóru tað onkrir steðgir innímillum, ið onkur gramdi seg um vóru ov drúgvir, men hinvegin var hetta eisini við til at skapa ein meira róligan stemning og møguleika at seta seg niður og heilsa upp á hvønnannan hetta kvøldið.

Eisini ber til at kjakast um, tað er við at koma inflatión í prísir og herðaklapp her í Føroyum við teimum nógvu virðislønunum og atkvøðugreiðslunum, ið hava stungið seg upp seinastu árini. Sjálvur haldi, eg at tað at rósa hvørjum øðrum ongantíð kann skaða, so leingi tað ikki verður skammrós, og vit geva teimum erlig herðaklapp, sum hava uppiborið tað.

Tað vísti nevniliga tað skreytklædda gallakvøldið á Hotel Føroyum, ið egnaði seg væl sum karmur til Planet Awards.

Eisini Útvarpið var sum nevnt við hetta kvøldið, og var tað manningin úr Pegasus, sum var í Ringrás rundan um planetirnar leygarkvøldið, ið vóru varpaðar út til alt Føroya fólk.

Eftir er so kanska hjá onkrum rúmdarmanni at spyrja um lív er á mars, ella um fólk veruliga hava verið á mánanum? Ja, svarið upp á teir spurningarnar stendur enn og veittra í vindinum Í øllum førum kann eg siga, at tað var fínt á Planet leygarkvøldið. Og har var lív í.

# Røðan hjá Jan Müller og grundgevingin fyri at geva Kristiani Blak ta serstøku Planetvirðislønina:

"Tað er ivaleyst einki einstakt fólk, ið hevur hevur havt so stóran týdning fyri føroyska tónleikalívið, sum Kristian Blak. Tí gleðir tað meg at sleppa at geva Kristiani hetta Planet-herðaklappið.

Kristian hevur sum virkin tónleikari og tónasmiður ríkað nógv um føroyska mentanarskattin. Vit hoyrdu fyrr í kvøld Yggdrasil. Hettta er bert ein av bólkunum hjá Kristiani, ið hevur verið við til at breiða út kunnleikan um Føroyar úti í stóru verð.

Eisini sum tónleikaútgevari hevur Kristian uppiborið eitt herðaklapp. Tað eru fáir føroyskir tónleikarar, ið ikki hava útgivið tónleik hjá TUTL, ella hava spælt á útgávum hjá TUTL. Hetta sæst millum annað aftur í tilnevningunum í kvøld, har fýra av teimum fimm tilnevndu fløgunum er útgivin av TUTL.

Sum fyriskipari hevur Kristian somuleiðis eitt herðaklapp uppiborið. Hann hevur ríkað okkum við tiltøkum sum Summartónum og Fólkatónleikarastevnuni, fyri ikki at tosa um arbeiðið í jassfelagnum.

Eg kundi staðið her til í morgin, um eg skuldi nevnt alt, sum Kristian hevur gjørt fyri føroyska mentan. Ístaðin vil eg bara handa tær hetta Planet-herðaklappið.

Tillukku Kristian".

## Besti nýggi bólkur
**Vinnari:** Poppkorn
**Tilnevnd:** Poppkorn, Marius, Petur Pólson, The Dreams og Lama Sea

## Besti útlendski bólkur
**Vinnari:** Nephew
**Tilnevnd:** Green Day, James Blunt, Madonna, Nephew og Tim Christensen.

## Ársins sangari
**Vinnari:** Kim Hansen
**Tilnevndir:** Kim Hansen, Janus Rasmussen, Brandur Karlsson Jacobsen, Kári Sverrisson og Teitur Lassen

## Besta songkvinna
**Vinnari:** Eivør Pálsdóttir
**Tilnevndar:** Lena Andersen, Guðrið Hansen, Petsi Tvørfoss, Eivør Pálsdóttir og Guðrun Sólja Jaocbsen

## Ársins bólkur
**Vinnari:** 200
**Tilnevnd:** GoGo Blues, 200, Marius, Lama Sea og Makrel

## Besta útgáva
**Vinnari:** Morning Dew - Høgni Lisberg
**Tilnevnd:** A Place to Stand On - Déjà vu,
Førist - Páll Finnur Páll,
Koma - Petur Pólson,
Morning Dew - Høgni Lisberg,
Viva La Republica - 200.

## Serlig virðisløn
Kristian Blak